VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri, turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og um kvøldið regn. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið sunnudagin:
Um morgunin stívt andøvsgul av vestri, turt og sólglottar, men sum frálíður upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Um kvøldið ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í hvassan vind av útnyrðingi, men hann minkar vindin um kvøldið. Týsdagin andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

Flogseyður

Tað broytist so mangt við tíðini. Eisini hátturin at fáa seyð at húsum, tá menn hava veirð á fjalli. Í fjarskotnum høgum eru teir farnir at nýta tyrlu at flyta seyðin heim við

FLUTNINGUR
Edvard Joensen

Farið er um javndøgur, og mikkjalsmessa er í næstu viku. Tað sigur nógvum tað, at nú nærkast álvarsliga heystfjøllunum.

Og so fara menn at merkja fepurin, sum mangur verður yvirtikin av hesa tíðina. Spenningurin økist, so hvørt kvøldini myrkjast. Og áðrenn teir vita av, koma boðini

»Vit fara á fjall í morgin. Men hesaferð fara vit at flúgva skurðin heim við tyrlu«.

Tað eru av sonnum nýggjar tíðir. Í hagapørtum, har tað fyrr hevur tikið eitt sjóvarfall ella so at fáa gonguna at húsum, verður hetta nú avgreitt upp á nakrar ferðir 10 minuttir.

Hetta er øgiligur lætti hjá fjallmonnunum. Einki at hugsa um soleiðis annað enn at fella tað, tikið er, og fáa í eitt ílat, sum tyrlan lyftir upp frá og fer avstað við. Og so sleppa menn eisini sitandi aftur at húsum.

Tað kann væl vera, at onkur heldur, at sumt er farið av lagi. Men viðhvørt er nýggja lagið bara nógv betri enn tað gamla.

Bæði fyri fólk og kríatúr.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	1
Nuuk	3
Qaqortoq	6
Ammassalik	7
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	–
Tórshavn	11
Lerwick	10
Aberdeen	13
London	17
Tromsø	12
Bergen	10
Oslo	–
Stokkhólm	13
Keypmannah.	15
Helsinki	10
Moskva	11
Berlin	13
Warzawa	12
Kiev	11
Bukarest	17
Paris	16
Madrid	28
Róm	24
Malorca	27
Athen	28
Malta	25
Tunis	27
Beijing	26
New Dehli	29
Bangkok	34
Jakarta	31
Sydney	19
New York	26
Miami	24
Los Angeles	30
Meksikobýur	19
Panama	–
La Paz	14
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	23

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 986 hPa. við Vestur-Noreg fer í landsynning, Ein hátrýstryggur yvir Grønlandsfjørðinum fer somuleiðis í landsynning.

Ein hátrýstryggur yvir Føroyum fer eystureftir og viknar. Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 22/09 kl. 06⁰⁰–23/09. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,2 mm – mált frá 22/09 kl. 06⁰⁰–23/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 165,5 mm

Morgunlestrar
27. septemb.–2. oktober

Johan Simonsen í Havn lesur

Sálmar:

Mánadagin 27. septemb.:
nr. 80 Lat títt dýrabara navn
nr. 84 Lat hurðar upp, ger borglið breið

Týsdagin 28. september:
nr. 320 Ger tað sindrið, tú kanst
nr. 192 Mín Jesus, lat mítt hjarta fá

Mikudagin 29. september:
nr. 68 Jesus, sjálvur kom til mín

Hósdagin 30. september:
nr. 53 Ongum er so trygt at fara
nr. 347 Fyri halgu føðing tína

Fríggjadagin 1. oktober:
nr. 557 Morgunstund á heimsins grund

Leygardagin 2. oktober:
nr. 576 Nú leiti eg til tína náði
nr. 387 Biðið, og tit skulu fá

VESTFALLSKYRRINDI

21. sept.: Fyrra kvarter
22. sept.: Mánin næstur jørðini
28. sept.: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
24. sep	03.51	16.19	02.51	15.19	03.06	15.34	05.51	18.19	06.51	19.19	02.06	14.34	01.06	13.34	04.06	16.34	05.06	17.34	03.36	16.04	04.51	17.19
25. sep	04.47	17.13	03.47	16.13	04.02	16.28	06.47	19.13	07.47	20.13	03.02	15.28	02.02	14.28	05.02	17.28	06.02	18.28	04.32	16.58	05.47	18.13
26. sep	05.39	18.02	04.39	17.02	04.54	17.17	07.39	20.02	08.39	21.02	03.54	16.17	02.54	15.17	05.54	18.17	06.54	19.17	05.24	17.47	06.39	19.02
27. sep	06.26	18.48	05.26	17.48	05.41	18.03	08.26	20.48	09.26	21.48	04.41	17.03	03.41	16.03	06.41	19.03	07.41	20.03	06.11	18.33	07.26	19.48

5 707265 100050 >